## Lær at skriva umsókn til Nordplus

Hósdagin 20. november 2008 skipar Altjóða Skrivstovan fyri kunningarfundi um Nordplus Junior. Fundurin verður í Jónas Broncksgøtu 25, frá klokkan 16.15 til 17.30, og vendir sær til øll starvsfólk innan skúlaverkið, sum hava áhuga í norðurlendskum og baltiskum skúlasamstarvi. Á fundinum fer Karin Kaikkonen, ið dagliga arbeiðir við Nordplus Junior á »Internationella Programkontoret« í Stokkhólmi, at hava framløgu. Í kunning síni fer Karin Kaikkonen millum annað at greiða frá hvørjum samstarvstiltøkum fíggjarligur stuðul kann søkjast til, mannagongdum í sambandi við umsóknir, hvussu ein góð umsókn skal síggja út, metingarstøði og dømum um góða praksis. Dentur verður lagdur á at lýsa ta góðu umsóknina. Raðfestingar í komandi umsóknarrundu, ið hevur evsta mark tann 2. mars 2009, eru veðurlagsspurningar, yrkisútbúgvingar, dygd í útbúgvingum, heilsa, fyribyrging av næmingafráfalli, ígongdsetan og fjølmentaði flokkurin. Endamálið við Nordplus Junior er at styrkja og menna samstarv millum skúlar á øllum stigum.



# Sjúkrahús ikki ráð til skurðvið



*Líka síðani í summar hevur Landssjúkrahúsið ikki havt ráð at leggjasjúklingar undir skurð, soleiðis sum ætlað og stjórin ásannar, at hetta er til stórt fortreð hjá sjúklingum, sum noyðast at ganga sjúkrameldaðir nógv longri enn ætlað*

**Í summar tvingaðu politikararnir Landssjúkrahúsið at seta sparingar í verk, og tað hava sjúklingarnir síðani goldið ein dýran prís fyri**

HEILSUVERK
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Hesar síðstu mánaðirnar hevur Landssjúkrahúsið ikki havt ráð at leggja nógvar sjúklingar undir skurð.

Tað er støðan á okkara meginsjúkrahúsi, nú tveir mánaðir eru eftir av árinum.

Fíggjarstøðan á Landssjúkrahúsinum hevur verið ein afturvendandi trupulleiki í nógv ár og tað er ferð eftir ferð komið fyri, at tey hava noyðst at seta sparitiltøk í verk, sum hava rakt sjúklingar í størri og minni mun.

### Ikki ráð at leggja undir skurð

Aftur í ár hava politikararnir kravt at Landssjúkrahúsið skal seta sparingar í verk og tað hevur rakt sjúklingarnar hart.

Tann mest álvarsliga avleiðingin hevur verið, at Landssjúkrahúsið í fleiri mánaðir ikki hevur havt ráð til at leggja sjúklingar undir skurð í tann mun, sum ætlanin annars var.

- Í summar kravdu politikararnir, at Landssjúkrahúsið skuldi spara tvær milliónir krónur og tað hevur ført við sær, at vit hava verið noydd at tálma virksemið hetta síðsta hálva árið, staðfestir Allan Skaalum, stjóri á Landssjúkrahúsinum.

Hann váttar eisini, at hesar sparingar hava rakt sjúklingarnar, tí tær hava ført við sær, at yvirhøvur eru allar tilrættislagdar skurðviðgerðir, sum kunnu bíða, útsettar til næsta ár.

- Fyrr í ár boðaðu vit politikarunum frá, at skuldi tað bera til at varðveita virksemið á Landssjúkrahúsinum óbroytt, máttu vit fáa 30 milliónir afturat í ár.

Men vit fingu at vita frá politiska myndugleikanum, at undirtøka fekst ikki fyri at játta okkum meiri enn 28 milliónir og sostatt vórðu vit noydd at seta sparingar í verk fyri tvær milliónir, sigur stjórin á Landssjúkrahúsinum.

- Sostatt mátti útreiðslurnar tálmast, men av tí at hetta var í summar, var meiningsleyst at fremja sparingarnar við uppsagnum, tí tey flestu starvsfólk hava seks mánaða uppsagnartíð, so at tað hevði ikki ført nakra sparing við sær.

Sostatt máttu sparingar finnast aðrastaðni og ein avleiðing hevur so verið, at ein stórur partur av teimum tilrættisløgdu skurðviðgerðunum eru útsettar til næsta ár.

Summar skurðviðgerðir hava verið framdar sum ætlað, eitt nú ymiskt, sum hevur við eygu og oyru at gera.

- Men ein stórur partur av øllum øðrum skurðviðgerðunum, sum ikki eru bráðneyðugar, eru útsettar til næsta ár.

Allan Skaalum nevnir í hesum sambandi, at stórur partur av teimum, skulu skifta liðir hava fingið boð um, at tey ikki sleppa framat fyrrenn næsta ár.

- Soleiðis hava vit gjørt av at fremja sparingarnar fyri ikki at nerva tilbúgvingina og alla tað bráðneyðugu viðgerðina.

### Longri bíðilistar

Stjórin á Landssjúkrahúsinum ásannar eisini, at sjálvandi hevur hetta ført við sær, at bíðilistarnir eru longdir, men hann dugir ikki at síga, hvussu nógv.

Kortini sigur hann, at frammanundan var bíðitíðin í Føroyum lutfalsliga stutt til nógvar av hesum skurðviðgerðunum, sum nú eru útsettar, aftur ímóti bíðitíðini í øðrum londum.

Hann ásannar at hetta er